# Miðvikan

Framhald frá síðu 33

meira og meira tarnað av slíkum, sum rakst á sjónum. Skjótt gjørdist aftur myrkt, sum so aftur vildi tarnað arbeiðinum.

Tá bjargingarliðið á landi kom fram, góvust teir at bjarga fólkinum yvir á Andvari. Tað eydnaðist við fyrsta skoti at fáa bjargingarlínu umborð frá landi av. Longu kl. 14.40 vóru 16 mans komnir í land, og tá var eingin á lívi eftir umborð. Umframt Sofus Skoradal vóru fýra íslendingar tá sjólátnir.

Teir av manningini, sum komu á land, vóru eisini illa fyri eins og hinir, ikki minst av kulda. Men her høvdu bjargingarmenninir verið so framskygdir at hava við sær eina fløsku av konjakk, sum fløvaði væl í hesi støðuni.

Tað varð havt á orði millum manna og í bløðunum, hvussu óttaleysir menninir á Egill Rauða høvdu verið, og menn undraðust eisini á, at teir toldu kuldan so væl, so illa teir vóru klæddir. Menninir, sum vórðu bjargaðir í land, máttu til gongu. Men nú var fjøra, so teir kundu ganga eftir bakkanum. Hetta var munandi styttri og lagaligari. Teir gingu kortini bert til bóndagarðin, hagani Gisli var ættaður, og her gistu teir. Hesin bóndagarður hevði staðið tómur í fleiri ár, og tí var kalt. Men inni var komfýrur, og teir brutu av viðinum í húsinum fyri at kyka, so tað var skjótt, at tað gjørdist heitt. Men tá vóru teir eisini allir heilt útlúgvaðir.

Sagt varð um skiparan, at hann hevði verið teimum ein góð fyrimynd í at skipa fyri bjargingini. Alla tíðina hevði hann staðið upp á brúgvartakinum, har hann skipaði fyri bjargingini og hjálpti monnunum í bjargingarstólin. Sjálvur var hann sum ein rættur skipari farin av skipinum sum tann seinasti.

Ein av føroyingunum Tórálvur Mohr Olsen av Sandi, hevur í útvarpinum og FF-blaðnum greitt frá, hvussu hann upplivdi hesa hending. Frásøgnin hjá honum varð endurgivin í Sosialinum, táið Tórálvur doyði nakað fyri kortum.



*Trolaramenn, helst føroyingar. Kennist nakar við hesar?*

# Sildavinnslan fjølbroytt fyritøka



*Hesi fimm gøtufólkini hava øll sítt serstaka tilknýti til Ísland og Eysturlandið. Frá vinstru av eru tey: Tórður Mikkelsen. Abbi hansara druknaði á Bakkafjørðinum í 1905. Kaj í Bartalstovu var elsti maður ferðalagnum, 85 ár. Kaj hevur sjálvur róð út á Bakkafjørðinum. Hann er systkinabarn Tórð, og tað var eisini abbi hansara sum druknaði í 1905. Óluva Tvørfoss hevði ein pápa, sum hevur fiskað nógv ár í Íslandi. Hon hevur altíð ynskt eftir at sleppa til Íslands, og var hetta hennara fyrsta ferð til higar. Hargarð,maður hennara, sigldi við íslendskum trolarum í 50-unum. Jákup Jacobsen, sum umboðar nútíðar samband við Ísland. Hann er reiðari á nótaskipunum í Gøtu, sum landa nógv á Eysturlandinum. Hann letur eisini væl at sínum íslendska sambandi*

Sum nevnt í seinasta parti vitjaði ferðalagið á Neskaupstaði Sildavinnsluna, sum er ein av teimum stóru fiskivinnufyritøkunum í Íslandi. Í býnum búgva eini 1.600 fólk. Saman við grannabygdunum er lagt saman í eina kommunu, Fjarðarbygd, har fólkatalið er um 5.000.

Sildavinnslan varð stovnað 11.desember 1957. Hon eigur fýra skip, og eru tað tvey nótaskip, ein ísfiskatrolari og ein frystitrolari. Nótaskipini hjá teimum veiða eisini svartkjaft. Afturat hesum hava teir fiskamjølsvirki og fiskavirki til viðgerð av feskum fiski. Her er tað eydnast teimum at fáa fótin innum hjá McDonalds.

Tilsamans arbeiða eini 220 fólk hjá fyritøkuni, og er hetta tískil ein fyritøka av stórum týdningi fyri fólkið á leiðini. Umsetningurin var í 2009 90 miljonir US dollar, umleið 500 mill. í okkara peningini. Sum tað skilst gongst heilt væl við rakstrinum.

Tann størsti parturin av virkseminum hjá Sildavinnsluni er fiskamjølsverksmiðjan, sum í fjør hevur framleitt 174.000 tonn av ráevni. Sildavinnslan hevur loyvi at veiða 9% av lodnukvotuni.

Karl Johann sigur, at teir gera ikki nógv av at keypa kvotur. Men teir gera rættiliga fitt burturúr at býta um kvotur. Teir hava til dømis rækjukvotur, sum teir býta um við pelagisk fiskasløg.

Uppisjóvarvirkið hjá teimum tekur fyrst og fremst móti sild og lodnu.

Teir frysta 3.000 t. av sild, sum fara eystureftir og eini 5.000 t. av lodnu til Japan. Afturat hesum framleiða teir fryst lodnurogn, sum geva lodnuna nógv størri virði.

Uppisjóvarvirkið tók ímóti 40.000 tonsum av sild til frystingar í 2009. Her var arbeitt í tveyskiftisvakt, 12 tímar hvørja ferð, eins og í Kollafirði. Hetta gevur fólkinum eina hampiliga inntøku. Tað eru framvegis fitt av polakkum, sum arbeiða á virkinum.

Annars søgdu tey á Neskaupstaði, at tey merktu ikki nógv til kreppuna, sum ríður Ísland sum ein marra. Tey fingu heldur ikki nakran lut í upplopinum sum var. Hetta var mest á Reykjavíkarleiðini. Tað er eisini her, tey mest merkja sviðan.

Men á hesum leiðum hava tey mest hildið seg til fiskivinnu, og har eru umstøðurnar tær somu, sum tær hava verið alla tíðina. Sagt varð eisini, at tey sum vildu arbeiða sluppu at arbeiða.

Vit hittu annars ein føroying á virkinum. Hetta er Dánjal Simonsen, ættaður úr Sandavági, sum er arbeiðsformaður. Hann hevur búð í Neskaupstaði í eini 20 ár. Hann hevur íslendska konu og honum dámar væl í Íslandi.

Samstarvið millum Føroyar og Sildavinnsluna sæst júst í hesum døgum skip teirra Børkur er á beding hjá Tórshavnar Skipasmiðju.

Tað ber til at kunna seg meira um Sildavinnsluna á www.svn.is

### Var við til at leita eftir pápanum

Ein av luttakarunum á ferðini Hargarð Tvørfoss úr Norðragøtu fekk eitt forvitnisligt prát inni á virkinum. Hargarð var ein av teimum mongum føroyingum, sum fór við íslendskum trolara í 50-unum. Hann fór í 1956 við Austfirðingi, sum hoyrdi heima á Eskifirði nærindis Norðfjørðin. Hetta fortaldi hann fyri manni á virkinum. Í mars hetta ár gjørdist eitt rættiligt ódnarveður. Ein bátur Hólmaborg, sum var farin til Danmarkar at fáa nýggjan motor, fekk hetta veðrið á seg og varð saknaður. Austfirðingurin var við í leitingini eftir bátinum, men einki kom burtur burtur. Báturin varð burtur við fýra ella seks monnum.

Tá kundi hesin maður rørdur fortelja Hargarð, at pápi hansara var við hesum báti.

Soleiðis komu hesir báðir at hittast aftur meira enn 50 ár eftir at teirra lagnur bóru saman.

**Rætting til seinasta part**
Nólsoyingarnar á Vattarnesi vóru helst har undir seinna heimsbardaga

**Komandi partur**
Í seinasta parti av hesi røð verður farið norður til Langanes, serliga Skálar, sum nógvir føroyingar eisini kendu. Eisini hava vit søguna hjá sørvingi, Hans Marius Hansen, sum búsettist á Skálum